Neistin-H71 33-28 (17-17):

# Neistamenn í hølunum á Kyndli

**Landsliðsleikarin Heini Hanusarson debuteraði á neistaliðnum og skoraði ikki færri enn ellivu mál sunnudagin, tá ið teir bláu úr Havn, í einum jøvnum og spennandi dysti, vunnu á hoyvíkingum og harvið fóru upp á annaðplássið í landskappingini**

HONDBÓLTUR
*Terji Nielsen*
*terji@sosialurin.fo*

Tað var ikki sørt av spenningi undan dystinum millum mansliðini hjá Neistanum og H71 sunnudagin. Ikki bert tí talan var um fyrsta dystin í grundspælinum, men eisini tí at Heini Hanusarson debuteraði fyri Neistan. Harafturat høvdu hoyvíkingar seinasta mikukvøld víst, at teir ikki eru at kimsa at, tá ið teir vunnu sannførandi á oddaliðnum Kyndli í fyrru hálvfinaluni í steypakappingini.



*Dragisa Stojovic og liðfelagarnir úr Neistanum tykjast í løtuni vera besta boðið um ein kappingarneyta til Kyndil, og at liðið nú hevur fingið Heina Hanusarson aftur, ger ikki útgangsstøðið verri*

## Javnt fyri steðgin

Tað gekk ógvuliga javnt á fyri steðgin. Liðini skiftust um at hava leiðsluna, og sjáldan vóru meira enn tvey mál á muni. Tað tóktist tó sum um, at álopið hjá hoyvíkingum hevði trupulleikar við stóru og vælvaksnu miðverju neistans við Birgiri Kass, Heina Hanusarsyni og Dragisa Stojovic á odda. Tá ið tað harafturat heldur ikki eydnaðist serliga væl at fáa gongd á vongspælið, dúvaði H71 fyri ein stóran part upp á einmansavrik frá Halgir Dahl-Olesen. Ikki kann sigast annað, enn at Halgir vísti seg frá síni bestu síðu í fyrra hálvleiki, tá ið hann skoraði ikki færri enn átta mál, fleiri av teimum við tí vælkendu undirhondskanónini. Trý av málunum gjørdi Halgir upp á brotskast, og tað var ein fragd at síggja, hvussu hegnisliga Halgir snýtti ein ikki sørt orkymlaðan Zelko Jotic í neistamálinum. Saman við einum sera vælleikandi Levi Nybo í hoyvíksmálinum syrgdi Halgir fyri, at tað stóð á jøvnum, tá ið farið var til hálvleiks.

Hjá heimaliðnum var serliga Buha á vinstra vongi ágrýtin fyri steðgin. Fleiri ferðir gjørdist hann leysur, og tá var lítið at gera hjá Levi í málinum hjá H71. Neistamenn fóru at mansverja Halgir Dahl-Olesen, tá ið einir átta minuttir vóru eftir av fyrra hálvleiki. Hetta førdi við sær, at álopini hjá hoyvíkingum gjørdist sera lang, og tað var fleiri ferðir, at dómararnir báðir høvdu hondina uppi fyri at markera nøl.

## Átta minuttir avgjørdu dystin

Beint eftir steðgin var ein heldur margháttlig hending. Í verjuni hjá hoyvíkingum stríddist Jákup á Borg við at ansa eftir strikuspælaranum hjá Neistanum, Birgir Kass. Hetta var sum at síggja dystin millum Dávid og Goliat, og tað mundi fáa smílið fram á teimum flestu, tá ið Jákup fekk ostaskorpuna fyri at hava verið ov harður við Birgir.

Annars helt seinni hálvleikur fram, har sum tann fyrri endaði. Liðini fylgdust væl, heimaliðið hevði sum oftast leiðsluna, men tá H71 skifti til eina offensiva 3-2-1 verju, ørkymlaði hetta ikki sørt álopsspælið hjá Neistanum, og bráddliga vóru hoyvíkingar á odda við tveimum málum 22-20! Hetta fekk neistavenjaran Dia Midjord til at taka eina time-out, og hvat hann segði við sínar menn er ikki gott at vita, tí átta minuttir seinni hevði Neistin skorað seks ferðir og hoyvíkingar ongantíð, og so var Neistin á odda 26-22. Hetta líkasum punkteraði hoyvíkingar, og tað er neyvan at taka munnin ov fullan at siga, at henda løtan avgjørdi dystin til fyrimuns fyri Neistan.

Neistin mansvardi Halgir, og tá ið hann var úti av myndini í álopsspælinum hjá hoyvíkingum, høvdu teir ikki serliga nógv at bjóða uppá. Tað er neyvan ov nógv sagt, at Halgir saman við Levi Nybo í málinum eru berandi kreftirnar hjá H71, og hava teir báðir ein góðan dag, kann alt henda.

Hovyíkingar royndu eisini at bróta álopsrútmuna hjá Neistanum við at mansverja Heina Hanusarson og Dragisa Stojovic móti endanum. Hetta eydnaðist partvís, men úrslitið bleiv at dysturin bleiv ógvuliga rótutur síðstu løtuna, og ikki færri enn níggju brotskøst vóru seinastu tíggju minutturnar.

Hóast hoyvíkingar onkuntíð nærkaðust neistamonnum, so var sigurin ongantíð í vandi síðstu løtuna.

## Breiddin á liðunum var munurin

Tað var ógvuliga týðuligt í dystinum sunnudagin, at tað var stórur munur á breidduni á liðunum báðum. Hjá H71 hvíldi alt ov nógv á herðunum hjá Halgir Dahl-Olesen, meðan neistamenninir høvdu væl álopsvápn. Bakkarnir báðir, Heini Hanusarson og Dragisa Stojovic, eru báðir sera skotsterkir, og harafturat hevur Neistin í Blagoje Buha ein ógvuliga góðan og málsøknan høgra vong. Tá ið so Áki Mørk, ið sat uttan fyri sunnudagin við skaða, verður við aftur sum spælskipari, hevur Neistin eina bak-ketu, ið kann geva hinum liðunum svøvnleysar nætur. Neistin er undir øllum umstøðum eitt lið, ið vit kunnu rokna okkum nógv av í endaspælinum.

## Gav vegleiðingar umvegis fartelefon

Danski venjarin hjá H71, Henrik Gerster, var ikki við í dystinum sunnudagin. Hann fekk reyða kortið í hálvfinaluni móti Kyndli mikukvøldið, og tískil noyddist hann at sita uttan fyri sunnudagin. Tá ið ein er leikbannaður, eins og Henrik Gerster var tað, er heldur ikki loyvt at sita á bonkinum. Tískil sat Henrik Gerster sunnudagin á einum stóli einar tríggjar metrar frá eykabonkinum hjá H71, men hann hevði heldur ikki loyvi til at samskifta við eykabonkin. Tað eydnaðist tó Henrik Gerster at samskifta við hjálparvenjaran Hall Danielsen á eykabonkinum. Viðhvørt sást stóri danin fara í lumman eftir fartelefonuni, og hvørja ferð gingu bert fá sekund, so fór Hallur, ið stóð einans tríggjar metrar frá dananum, eitt sindur til viks og tók fartelefonina fram. Løgið nokk koyrdu báðir tveir fartelefonuna í lumman samstundis hvørja einastu ferð!

## Dysturin í tølum

**Neistin-H71: 33-28 (17-17)**
**Málskjúttar**
**Neistin:** Heini Hanusarson 11(4), Dragisa Stojovic 10, Blagoje Buha 8(2), Ragnar Stakksund 2, Dan Torleifsson 1, Ári Rouch 1
**H71:** Halgir Dahl-Olesen 11(3), Johnny Durhuus 7(2), Heini Bentsen 4, Niels V. Niclasen 3, Kristian E. Zachariasen 3(2)
**Brotskøst:** Neistin 7(6) H71 10(7)
**Útvísingar:** Neistin 6, H71 7
**Dómarar:** Hannis Wardum og Eyðun Samuelsen – ongar trupulleikar av einum dysti, har menn ongantíð gjørdust ov heitir um skallan. Kanska slapp ein av útlendingunum hjá Neistanum heldur bíliga eftir at hava gjørt seg inn á Jákup á Borg.



# Havnarmenn veita klaksvíkingum hjálpandi hond

**Olaf Berg úr Havnini gjørdi av álvara bart sunnudagin, tá hann vann á svenska stórmeistaranum, Tiger Hillarp-Persson. Havnarmenn vunnu óvæntaðan stórsigur á kollfirðingum, samstundis sum klaksvíkingar vundu burturúr hvalvíkingum**

TALV
*Carl Eli Nolsøe Samuelsen*



*Olaf Berg framdi eitt satt bragd við sigrinum á Tiger Hillarp-Persson, og talvið teirra millum er eisini nýtt sum Talvið hesa vikuna*

Tvey umfør vórðu leikt um vikuskiftið í 1. deild. Vit byrja við leygardegnum, tá favorittliðini øll vunnu sínar dystir.

## 7. umfar

Við GM Tiger Hillarp-Persson á odda, varð eingin ivi um úrslitið móti botnliðnum úr Sandavági: 4-0 til Kollafjørð.

Í Havnini eydnaðist tað havnarmonnum at vinna tepran sigur á liðnum á táverandi triðja plássinum, Hvalvík. Við úrslitinum deildu bæði liðini triðja plássið undan 8. umfari, sum bleiv leikt sunnudagin.

Hjá toftamonnum eydnaðist tað óvæntað Øssuri Hansen at vinna á Finnbjørn Vang. Men tað bleiv einasta stigið toftamenn fingu í dystinum ímóti klaksvíkingum. Ógreitt er hví Jens Kristian Hansen hevur leikt so fá talv í ár við toftaliðnum. Í seinastu liðkapping varð hann toppskorari, og leikti øll tíggju talvini.

## Sensatiónin

At Olaf Berg vann á einum av tí sterkasta norðurlendingi í løtuni, stórmeistarin Tiger Hillarp-Persson, var ikki einasta sensatión sunnudagin; Havnin, sum einki hevur havt at reypa av hetta kappingarárið, eyðmýktu kollfirðingar við knúsandi 3,5 — 0,5 sigri.

T iger hevði eitt gott talvár í fjør. Hann leikti m. a. javnt móti Anand í einari kviktalvskapping í desembur, og eftir at hava leingi ligið undir 2500-markinum, hevur hann nú 2530 á altjóða ratinglistanum. Men í talvinum móti Olaf, sást ikki at munurin er 400 ratingstig. Tvørturímóti. 17 ára gamli Olaf Berg lumpaði Tiger tíðliga í talvinum, og førdi ein tryggan sigur í land.

Hinir havnarmennirnir høvdu eisini viðvind. Bogi Ziska og Herluf Hansen vunnu kanska sindur óvæntað á ávíkavist Hans Kristian Simonsen og Torbjørn Thomsen. Talvið á fjórða borði endaði javnt. Sí einkultúrslit og støður aðrastaðni í blaðnum.

Klaksvíkingar eru óivað fegnir um góða úrslitið hjá havnarmonnum. Teir styrktu um oddastøðuna við stórsigri á hvalvíkingum, og eru nú hálvtfjórða stig fremstir. Ólavur heldur fram við góðum úrslitum.

Botndysturin endaði við 3-1 sigri til sandavágsmenn. Tó skal framvegis eitt undur til, um sandavágsmenn skulu halda sær uppi í fremstu deildini. Hálvtfjórða stig eru upp til júst toftamenn.

Tvey umfør eru eftir at leika. Komandi umfar verður oddabrak í Klaksvík, og spurningur er um Tiger verður við kollfjarðaliðnum. Hann telvar eisini við Brønshøj í donsku 1. deild, og teir skula leika dyst móti føroyska felagnum í Keypmannahavn júst sama dag sum 9. umfar er í Føroyum, nevnliga 1. februar.

## Anand endurvann Wijk aan Zee

Júst sama stigatal sum í fjør, fekk Anand í árligu Wijk aan Zee kappingini; 8,5 stig av 13 møguligum. Indarin vann fimm talv, leikti sjey javnleikir og tapti eitt talv.

Innan næstseinasta umfar hevði Anand telvað í serklassa og einki talv tapt, men Topalov fekk steðgað honum í einum góðum talvi. Eisini eydnaðist tað Sokolov at vinna óvæntað leikandi lætt á Kramnik í næstseinasta umfar. Kramnik hevði eina vánaliga kapping, tá hugsað verður um at hann við hægsta ratingtali varð styrkismettur ovastur. Bert 6,5 stig fekk Kramnik.

Bologan og van Wely yvirraskaðu positivt, meðan serliga Svidler og Shirov saman við Kramnik fullu niður ímillum á hesum sinni.

## Endaliga støðan

| | | |
|---|---|---|
| 1 Anand | (2766) | 8,5/13 |
| 2 Leko | (2722) | 8,0 |
| 3 Adams | (2720) | 8,0 |
| 4 Topalov | (2735) | 7,5 |
| 5 Bologan | (2679) | 7,5 |
| 6 Kramnik | (2777) | 6,5 |
| 7 Van Wely | (2617) | 6,5 |
| 8 Bareev | (2714) | 6,5 |
| 9 Svidler | (2747) | 6,0 |
| 10 Akopian | (2693) | 6,0 |
| 11 Shirov | (2736) | 6,0 |
| 12 Sokolov | (2706) | 5,0 |
| 13 Zhang | (2639) | 5,0 |
| 14 Timman | (2578) | 4,0 |

# Talvið hesa vikuna

Olaf Berg (2159) — GM Tiger Hillarp-Persson (2530)
FM-liðkappingin (8. umf.)
25.01.03

1.e4 g6 2.Rif3 Bg7 3.d4 d6 4.Bc4 Rif6 5.Fe2 0—0 6.0—0 Bg4 7.Rd1 Ric6 8.e5 (Áhugaverdur leikur. Olaf er ikki bangin.) 8...Bxf3 9.gxf3 Rid7 10.f4 e6 11.c3 Fh4 12.Ria3 Rie7 13.Ff3 a6 14.Kh1 d5 15.Be2 c5 16.Ric2 Rac8 17.Rie3 (Riddarin kemur við í leikin. Nøkunlunda jøvn er støðan) 17...Ric6 18.Fg3 Fxg3 19.hxg3 cxd4 20.cxd4 Rc7 21.b3! (Bispurin kemur skjótt til sín rætt) 21...Rfc8 22.Ba3



DIAGRAM
Støðumynd eftir 22.Ba3

22...Bf8? 23.Bd6! Hendan leik yvirsáð svenski stórmeistarin. Álítandi keldur siga, at Sviin suffaði óført tá Olaf leikti leikin! 23...Rib6 Verður Bxd6 leikt, verður rókurin fangaður) 24.Bxc7 Rxc7 25.Rac1 Ba3 26.Rc2 Rc8 27.b4! (Djúpur leikur. Olaf letur finnuna fyri opnari spæl omaneftir b-linjuni) 27...Bxb4 28.Rb1 Ba5 29.Rig4 (Fyrsti ivasami leikur hjá Olaf. Hann gevur Tiger eina lívlinju, sum sviin tíbetur ikki sá) 29...Kg7? (Tiger hevði her møguleikan at minka um trýstið við Rixd4, men stórmeistarin var neyvan komin yvir sjokkið at missa sín rók, og fann ikki rætta leikin) 30.Rd1 Rb8 (Rixe5 hevði verið væl betur) 31.a3 Rid7 32.Bxa6 Rixd4 33.Rxd4 bxa6 34.Ra4 Rb5 35.Kg2 Rib6 36.Rd4 Ric4 37.Rif6 Rc5 38.Kh3 h5 39.Rie8+ Kf8 40.Rid6 (Soleiðis. Olaf avviklar støðuna til vunnið endatalv) 40...Bb6? (Besti møguleiki var 40...Rixd6 41.Rxc5 Bb6) 41.Rixc4 dxc4 42.Rdxc4 Rxc4 43.Rxc4 (Ræður um at halda høvdið kalt nú og nervarnar uppá pláss) 43...Bxf2 44.Ra4 g5 45.fxg5 Kg7 46.Kh4 Kg6 47.Rf4 Bc5 48.Rf6+ Kg7 49.Kxh5 Bxa3 50.g6! fxg6+ 51.Kg4 (Gott telvað av Olaf. Tekur tað fullkomiliga róligt. Veiku finnurnar hjá svørtum fara ongan veg.) 51...Bb2 52.Rxe6 a5 53.Kf4 a4 54.Re7+ (Kongurin verður trýstur aftur í borð) 54...Kf8 55.Ra7 a3 56.e6 Bc1+ 57.Ke4 Bb2 58.Kd5 g5 59.Kd6 (e7+ og Ra1+ kann ikki forðast) 59...Bf6 60.Rf7+ 1-0

# Úrslit og støður

**1. deild - 7. umfar**

| | | |
|---|---|---|
| **Klaksvík** | **Toftir** | **3-1** |
| Ólavur Simonsen | Helgi Joensen | 1-0 |
| Rani Nolsøe | Justinus Hansen | 1-0 |
| Finnbjørn Vang | Øssur Hansen | 0-1 |
| Tummas M. Anthoniussen | Oddmar Andreasen | 1-0 |
| **Havnin** | **Hvalvík** | **2,5-1,5** |
| Olaf Berg | Martin Brekká | 1-0 |
| Bogi Ziska | Finnbjørn Zachariassen | 0,5-0,5 |
| Herluf Hansen | Sámal Christiansen | 1-0 |
| Óli Joensen | Gunnar Joensen | 0-1 |
| **Sandavágur** | **Kollafjørður** | **0-4** |
| Torkil Nielsen | Tiger Hillarp-Persson | 0-1 |
| Bernhard Augustinussen | Hans Kristian Simonsen | 0-1 |
| Sonni Nielsen | Torbjørn Thomsen | 0-1 |
| Jónfinn Thomsen | Eyðálvur Johannesen | 0-1 |

**1. deild - 8. umfar**

| | | |
|---|---|---|
| **Hvalvík** | **Klaksvík** | **0,5-3,5** |
| Martin Brekká | Ólavur Simonsen | 0-1 |
| Finnbjørn Zachariassen | Rani Nolsøe | 0,5-0,5 |
| Sámal Christiansen | Finnbjørn Vang | 0-1 |
| Gunnar Joensen | Tummas M. Anthoniussen | 0-1 |
| **Toftir** | **Sandavágur** | **1-3** |
| Wensil Højgaard | Torkil Nielsen | 0-1 |
| Justinus Hansen | Bernhard Augustinussen | 0-1 |
| Øssur Hansen | Sonni Nielsen | 0,5-0,5 |
| Oddmar Andreasen | Jónfinn Thomsen | 0,5-0,5 |
| **Kollafjørður** | **Havnin** | **0,5-3,5** |
| Tiger Hillarp-Persson | Olaf Berg | 0-1 |
| Hans Kristian Simonsen | Bogi Ziska | 0-1 |
| Torbjørn Thomsen | Herluf Hansen | 0-1 |
| Eyðálvur Johannesen | Jógvan Joensen | 0,5-0,5 |

**Støðan 1. deild**

| | |
|---|---|
| 1. Klaksvík | 24,0 |
| 2. Kollafjørður | 20,5 |
| 3. Havnin | 18,0 |
| 4. Hvalvík | 15,0 |
| 5. Toftir | 11,0 |
| 6. Sandavágur | 7,5 |

**2. deild, 8. umfar**

| | | |
|---|---|---|
| Kollafjørður | Vestmanna | 1-3 |
| Havnin | Vestmanna 2 | 2,5-1,5 |

**Støðan 2. deild**

| | |
|---|---|
| 1. Vestmanna | 22,0 |
| 2. Havnin | 15,0 |
| 3. Kollafjørður | 9,5 |
| 4. Klaksvík | 9,0 |
| 5. Vestmanna 2 | 8,5 |

**Unglingar**

| | |
|---|---|
| 1. KTFa | 27,0 |
| 2. KTFb | 21,0 |
| 3. HTa | 19,5 |
| 4. GT | 17,0 |
| 5. ST | 17,0 |
| 6. TT | 16,5 |
| 7. HTb | 15,0 |
| 8. VTa | 12,5 |
| 9. MT | 8,5 |
| 10. Rókur | 7,5 |
| 11. VTb | 0,5 |

3. deild

| | |
|---|---|
| 1. HT3 | 30,0 |
| 2. HT4 | 25,5 |
| 3. ST2 | 24,5 |
| 4. GT | 23,5 |
| 5. Rókur | 13,0 |
| 6. VT3 | 12,0 |
| 7. MT | 7,5 |